Summarkapping 2007

Aalborg:

# Ein býur fyri øll

**Uttan mun til um tú ætlar tær at keypa, íðka ítrótt, stuttleika tær ella vitja mentanarlig tiltøk, so er Aalborg rætti býurin. Hann hevur nevniliga nógv at bjóða innan øll hesi øki**

SUMMARKAPPINGIN
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*



*Handilsviðurskiftini eru sera góð í stóra Bilka sentrinum, sum liggur í útjaðaranum av Aalborg. Umframt sjálvan handilin, Bilka, so er sølumiðstøðin skipað, sum ein stór handilsgøta við einum torgi í miðdeplinum*

Sum aðrir stórir býir í Evropa, hevur Aalborg nógv at bjóða ferðafólki. Í blaðnum í gjár nevndu vit Tivoli Karolinelund, djóragarðin, Aalborg Zoo, og tann sera hugnaliga miðbýin við teimum mongu gongugøtunum.

Eru handilsviðurskiftni í miðbýnum góð, so eru tey kanska enn betri í stóra Bilka sentrinum, sum liggur í útjaðaranum av Aalborg. Umframt sjálvan handilin, Bilka, so er sølumiðstøðin skipað, sum ein stór handilsgøta við einum torgi í miðdeplinum. Í hesum innandura handilsgøtum eru alskins handlar – alt úr frukt og grønmetishandlum og kioskum til klædna –og fløguhandlar. Eins og í miðbýnum er her eisini góður møguleiki at stilla svongdina og tostan, tí matstovur og kaffistovur tróta ikki.

### List og søga í miðbýnum

Aalborg er eisini býurin, ið setur mentan og list í hásæti. Stutt frá miðbýnum, umleið 10 min. til gongu, er kenda listasavnið í Aalborg. Fólk í hópatali vitja listasavnið, har bygningurin í sjálvum sær er eitt satt listaverk.

Innan er bygningurin eisini serligur. Alt innbúgv, t.e borð, stólar, hurðar, vindeygu, trappur, hondtøk og lampur eru teknað júst til Nordjyllands Kunstmuseum, sum listasavnið eitur. Finski arkitekturin, Alvar Aalto, er av tí fatan, at ljósið í einum listasavnið kann samanberast við akustikkin í eini konserthøll, og ljósið setur tí sín serliga dám á listasavnið og tey listaverk, ið har eru.

Av tí at bygningurin er so serligur, sum hann er, so eru listaverkini hareftir. Tað er nevniliga ikki eitt og hvørt listaverk, ið sleppur inn um hesar dyr.

Í Algade, sum er mitt í býnum, er Fornminnissavnið í Aalborg, Historisk museum, sum sigur søguna hjá keypstaðnum seinastu 1000 árini. Umframt at hava serligar framsýningar, sum skifta alt árið, so eru eisini fastar framsýningar – tað eru framsýningar, ið standa frammi alt árið. Ein tann best umtókta er Aalborgstovan frá 1602. Eins og Aalborg Zoo so skipar Aalborg historisk museum eisini fyri undirvísing, um skúlaflokkar eru áhugaðir í tí.

Nørresundby – ein partur av Aalborg

Aalborg liggur við Limfjørðin, og til ber at ferðast um fjørðin eftir brúnni ella ígjøgnum ein undirsjóvartunnil. Gongutúrurin um brúnna er stak góður í góðum veðri. Útsýnið yvir fjørðin er gott, og til ber at eygleiða mongu skipini, ið liggja í havnini og teir mongu stuttleikabátarnar, ið ferðast eftir firðinum. Yvirumkomin ert tú í Nørresundby, sum er ein partur av Aalborg kommunu. Ein stak hugnaligur býur. Eisini her ber til at njóta lítla, hugnaliga miðbýin, ið er stutt frá brúnni.

Ein av bestu svimjihøllum í Aalborg er júst í Nørresundby. Hetta er ein sera nýmótans svimjihøll við øllum hentleikum bæði til børn og vaksin. Ein heitur barnahylur við 60 metra langum rutsjibana, er júst tað, ið børnunum dámar. Tey, ið tíma at svimja, hava høvi at svimja í einum sera góðum 50 metra langum hyli, og fyri teimum, ið betur dáma at taka sær av løttum og hugna sær, er møguleiki fyri bæði boblibaði og turkiskum baði.

Í síðstu greinini um ferðamál í Norðurjútlandi, fara vit at siga eitt sindur um umráðið norðan fyri Aalborg, og teir ferðamøguleikar, ið hetta umráðið hevur at bjóða.



*Puntur nummar 8 av 23*




www.sansir.fo

Uttan mun til hvar, og hvussu leiðin gongur, er tað umráðandi at fara tryggur avstað. Byrja ferðina hjá okkum, soleiðis at tú fært allan tín tørv nøktaðan og tryggur kanst njóta ferðina.

Kongabrúgvin, Postboks 329, 110 Tórshavn, Tel 345600, Faks 345601, tf@trygging.fo, www.trygging.fo

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
- so ert tú tryggari